## HEILSANIR



**Góði fitti Sveinur**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góður við meg.
**Heilsan Bjørn**



**Góða Herborg**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 14. jan. Eru vit ikki fitt á myndini?
**Poul**



**Góði Marcus**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 12. jan.
**Ynskja mamma og Hans Magnar**



**Allarbesta mostur**
Lukku og gleði á tínum 25 ára føðingardegi. Vit eru so góð við teg
**Jónberg, Leiki og Fríða**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum 14. jan. Eg elski teg.
**Árant**



**Okkara allarbesta Maria**
Hjartaliga tillukku á 20 ára degnum í dag. Muss og klemm frá
**Allan og Niels Juul**



**Góða Maria**
Hjartaliga tillukku á 20 ára degnum í dag. Jesus signi framtíð tína. Frá okkum í Søldarfirði.
**Birgit**



**Góði elskaði Sveinur**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og Páll**


**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.....................................................................
....................................................................................
....................................................................................
....................................................................................
....................................................................................
....................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ........................................................................

Bústaður: ...................................................................

Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«


# Heimskendir tónleikarar í Ósáskúlanum




*Ein spennandi konsert verður í skúlanum við Ósánna í Klaksvík leygardagin klokkan 16*

**Leygardagin verður ein konsert við heimskendum tónleikarum og 17 sangarum í skúlanum við Ósánna í Klaksvík**

TÍÐINDASKRIV

Klokkan fýra leygardagin verður ein áhugaverd konsert í skúlanum við Ósánna í Klaksvík. Á skránni verða Rut Ingólfsdóttir, sum byrjaði at spæla violin sum fimm ára gomul, klaverleikarin Gerrit Schuill og 17 sangarar verða eisini við.

Rut Ingólfsdóttir, sum er virkin violinspælari, hevur áður vitjað í Føroyum - eitt nú saman við íslendska symfoniorkestrinum - har hon eisini hevur verið solistur. Eisini vitjaði hon Føroyar í 1997. Hon er sera vælkend í Íslandi.

Nevnast kann, at hon var á almennari vitjan í Føroyum í 1998 saman við manni sínum Bjørn Bjarnasyni, sum er løgmálaráðharri í Íslandi.

Rut hevur undirvíst á tónlistaskúlanum í Reykjavík og var stovnari av Reykjavíkar strúkiorkestri, sum hon eisini hevur verið leiðari á.

Gerrit Schuil, búsitandi í Íslandi, er úr Hálandi. Hann er ein frálíkur klaverspælari og hevur havt so frægar lærarar sum eitt nú John Lill og hevur havt fleiri konsertir í Royal Albert Hall í London.

Á konsertini luttaka eisini 17 Sangarar við norðurlendskum sangum.

# Føroyingar framsýning í Danmark

Tríggir føroyingar fara at hava framsýning í Kolding í januar mánaði. Talan er um tey trý Marius Olsen, Eli Smith og Jóna Rasmussen. Marius og Eli fara at hava framsýningina saman í Det Gamle Borgerhus í Kolding. Ferniseringin til ta framsýningina verður leygardagin tann 15. januar frá klokkan 11 til 13. Marius sýnir fram grafiskar myndir, meðan Eli fæst við málningalist. Hendan framsýningin verður opin frá 16. – 29. januar.

Framsýningin við Jónu Rasmussen verður á Kolding Uddannelses-center, har fernisering eisini verður mánadagin tann 17. januar klokkan 18. Jóna Rasmussen sýnir eins og Marius Olsen grafiska list fram. Hendan framsýningin verður opin frá 17. – 28. januar.

**- sae -**